# Guðrun og Guðrun gera um seg á heimsmarknaðinum

**Gomlu stjørnumynstrini í nýggjari útgávu hava gjørt Guðruna og Guðruna til eitt sterkt brand, ið ger um seg í Tokyo, Milano og París, í síðstu viku gjørdu føroysku sniðini innrás í London.**

**FUNKY FAROE ISLANDS**
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Guðrun Ludvíg, ið er kreativa helvtin av Guðruni og Guðruni, var væl nøgd við Funky Faroe Islands tiltakið, ið hon helt vera sera professionelt fyriskipað.

– Hetta eigur Annleyg á Menningarstovuni at fáa rós fyri, segði Guðrun og helt fram:

– Týsdagurin var góður, og eg fekk váttað, at vit eru á rættari leið. Tey við pallborðið prátaðu um at fáa sær ein partnara, ið tók sær av teimum pørtunum av virkseminum, sum ikki hevði við design at gera, og hetta er akkurát tað, sum eg og Guðrun gera. Hin Guðrun fer nú upp til at arbeiða fulla tíð við okkara virksemi.

Guðrun Ludvíg kom til Funky Faroe Island í London beinleiðis úr París, har hon hevði sýnt fram á Tranoi, ið er tann viktigasta messan á Paris Fashion Week. Fyri at sleppa við skal eitt upptøkupanel velja teg. Harafturat er messan sera dýr at luttaka á. Men fyri Guðrun og Guðrun er hetta eitt natúrligt stig.

– Tranoi er ein ordiliga góð messa við ordiligum flow yvir sær. Har koma teir heilt røttu keypararnir, og tað er týdningarmikið hjá okkum at vísa andlit, greiður Guðrun frá.

Guðrun og Guðrun er vorðið eitt sterkt brand, og heimsmarknaðurin er komin við. Hetta sást til dømis í nýggjastu italsku útgávuni av Vogue, har sniðini hjá Guðruni og Guðruni verða víst fram. Hetta er eitt sera týdningarmikið blað, sum altíð er útselt og týdningurin av at verða víst fram í hesum blaðið, eigur ikki at undirmetast.

– Eg var sjálv í Milano í sambandi við hetta, og tað er øgiliga stuttligt, at sleppa við í eitt sovorðið blað, sigur Guðrun.

Størsti marknaðurin hjá Guðruni og Guðruni er í Japan. Tey stóru mótahúsini í Japan hava tikið Guðrun og Guðrun til sín og eru imponeraði av at Føroyar finnast og yvir, at vørurnar allar eru hondbundnar.

– Vit hava í løtuni 12 bindikonur, men hava trupult við at fylgja við eftirspurninginum. Tað krevst nógv av bindikonunum, tær skulu allar binda líka, og duga at halda deadline. Tær eru sera týdningarmiklar fyri okkum og eiga ikki at verða gloymdar, sigur Guðrun.

Á mótasýningini í London vístu Guðrun og Guðrun fram eitt bland av summar- og vetrarvørum.

– Hetta var fyri at vísa okkara bílæt - hvat tað er sum vit hava at bjóða. Men okkara sterkasta síða er vetur. Vit arbeiða við tí løttu fløtu bindingini. Míni snið byggja á tey gomlu føroysku mynstrini. Eg taki gamla stjørnumynstrið og geri eina nýggja dagførda útgávu av tí, og hetta vekir ans uttanlands. Á Tranoi messuni í París var nógv diskusjón um stjørnutroyggjurnar, greiðir Guðrun frá.

Føroyski marknaðurin er spakuliga eisini komin við, og hetta gleðir Guðruna.

– Í byrjanini, tyktist fólk at hugsa, hatta kunnu vit binda sjálvi, og tí vildu tey ikki keypa okkara troyggjur. Men hetta er broytt eitt sindur. Eg upplivdi tildømis, at ein kona og dóttur hennara komu inn og keyptu eina stjørnutroyggju. Mamman hevði boðið dóttrini, at hon kundi binda henni troyggjuna, men dótturin vildi hava eina originala Guðrun og Guðrun troyggju. Tá hugsaði eg YES!

– Vit mangla altíð dugnaligar bindikonur og við vaksandi eftirspurninginum mugu fleiri koma til. Vit hava roynt at tosa við skúlarnar um at fáa binding inn aftur í skúlagongdina, soleiðis at hetta handverkið ikki dettur niður fyri, sigur Guðrun.



*Á Funky Faroe Islands sýndu Guðrun og Guðrun fram eitt bland at summar- og vetrarmóta*



*Jóhanna av Steinum vísti at binding kann brúkast til okkurt sum er meira elegant enn vetrartroyggjur.*

## Hetta er stórt fyri meg!

**Jóhanna av Steinum sleppur ikki inn á London Fashion Week sum áskoðari, so tá onkur sigur, at hon kundi sýnt fram har, er hon sannførd um, at betri kompliment kundi hon ikki fingið.**

**FUNKY FAROE ISLANDS**
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Jóhanna av Steinum var nógv minst viðurkenda navnið av føroysku sniðgevunum, ið sýndu fram á Funky Faroe Islands. Hóast hetta vóru nøkur av sniðunum hjá Jóhannu av mótatíðindakvinnuni Wendy Scott tikin fram sum verandi millum tey bestu hendan dagin, og hon helt at okkurt av teimum kundi farið beint á London Fashion Week.

– Tað er ótrúligt, at fólk, sum hevur skil á tí, sigur sovorðið, sigur Jóhanna sjónliga væl nøgd.

– Vanliga sleppa fólk sum eg, slettis ikki framat hesum fólkum. Eg sleppi til dømis ikki inn á London Fashion Week sum áskoðari, og tá ein kvinna sum Wendy Scott sigur, at eg kundi sýnt fram har, so er tað ordiliga gott. Eg haldi ikki eg kann fáa betri kompliment. Vanliga fær man ikki feedback uppá síni design, so hetta er stórt fyri meg, greiðir Jóhanna frá.

Á Funky Faroe Islands valdi Jóhanna at sýna fram ymiskt, ið hon hevur arbeitt við seinastu tíðina. Hon var ikki heilt greið yvir, hvussu heildin fór at rigga saman, og snýkti seg tí inn á skúlan tað eina kvøldið, har lat hon ginir í klæðini og lukkutíð riggaði alt saman.

– Eg havi ein nokkso kommersiellan stíl. Fólk skal kunna vera í klæðunum, sum eg geri. Alt er bundið, so nógv arbeiði er av tí, so tí vil eg sleppa av við tað, sum eg geri, greiður Jóhanna frá.

Umleið helvtin av klæðunum, ið Jóhanna sýndi fram í London var bundin við hond, hin helvtin við maskinu.

– Eg vil vil gjarna brúka binding til okkurt annað enn vetrartroyggjur, gera okkurt, sum er eitt sindur meira elegant.

Jóhanna lesur á St. Martins sniðgevanar skúlanum og er júst byrja á síðsta árið har. Hon hevur grundútbúgving av London College Of Fashion. Í næstum ferð hon undir kollektiónina, ið er hennara síðsta verkætlan á skúlanum, um henda kollektíon er nóg góð, so sleppur hon við á eina mótasýning, nakað ið Jóhanna vónar. Síðan skal avgerast, hvat hon víðari ger.

Hon heldur, at Funky Faroe Islands er eitt sera væleydnað tiltak.

– Eg fekk eitt sindur burtur úr, eg kendi øll støðini og fólkið, ið tey tosaðu um við pallborðið. Serliga áhugavert var at hitta Hilary Riva (ið er forkvinna í British Fashion Council og høvuðsfyriskipari av London Fashion Week), og hoyra »first hand« hvussu tú gert, sigur Jóhanna.

Hon heldur ráðstevnuna vera eitt sera jaligt átak, og gott er at onkur setur fokus á okkurt annað enn t.d. fótbólt heldur hon, stutt sagt metur hon, hetta vera eitt fantastiskt tiltak.